TING-HELLAN

# vør torir at taka støðu?



og menningin í biotøkni er so skjót, at tíð ikki er til hesa viðgerðartíð. Her skal samfelagið eisini taka støðu til hvørji virðir eru mest umráðandi, t.d. at tryggja fyritøkum inntøkur umvegis einkarætt ella t.d. at brúka biotøkni til betri landbúna í 3. heims londum, og soleiðis brúka tøknina ímóti fátækradømi.

Tá talan er um einkarætt í biotøkni, tykist tað at verða mest semja um, at tað er í lagið, tá talan er um viðgerð av álvarsomum sjúkum. Men tað gerst trupult, tá vit flyta okkum inn á økið, tá endamálið við biotøkni gerst at betra um menniskja, altso tá fokus fer frá leking til betring.

## Lutligsgering - ítøkiliggering

At geva einkarætt til ílegur, er at geva eitt slag av ognarrætti í ílegur og upprunakyknur. Morten Dige vísur á, at John Locke filosofiskt vísti á, at einstaklingar hava rætt til tað, sum teir hava skapt ella virðisøkt við arbeiði. Men tá vit geva einkaætt í ílegum, geva vit einkarætt í eginvirðið náttúrinnar, sum er ein felags mannaarvur, ið verður lutliggjørdur. Hesin kritikkurin í biotøkni roynir at mótvirka, at ílegur og upprunakyknur verða koyrdar beint á marknaðin.

## Einkarrætt til bróstkrabba

Ein av aktuellu trupulleikunum er einkarætturin til BRCA1 og BRCA 2 ílegurnar, sum verða settar í samband við bróst- og eggrótakrabba. Amerikanska felagið Myriad Genetics hevur einkarrættin í USA, Canada og Japan og nú eisini í Evropa. Einkarætturin hevur við sær, at einstakligurin ikki sjálvur avgerð, um ílegurnar skulu kannast fyri broytingar og at (framleiðslu)virkið í veruleikanum hevur ognarrættin. Trupulleikin er, at einstaklingurin ikki frítt kann velja um ella hvussu kanningar skulu gerast og setir hetta tær avgerðir, einstaklingurin skal taka viðvíkjandi sjúkuvanda, viðgerðarvanda og hvør skal ráðgeva, í ein vavstur,

## Eru ílegur vørur?

Sigast kann, at trupulleikar kunnu standast av at geva vørueinkarrætt í ílegum og upprunakyknum. Til ber at avmarkað møguleikarnar fyri einkarætti í størst møguligan mun, men tað er tengt at virðinum, vit leggja aftanfyri avgerðirnar. Her kunnu verða mótstríðandi áhugamál, sum t.d. einkarrætt fyri at fáa íløgur, medisinsk fyri at betra um heilsuverkið og átrúnaðarligt og siðsemiligt í mun til fólksins hugburð á økinum. T.d. kann tað tala fyri, at hava víðar ræsir fyri einkarætti í ílegum, fyri at fáa kapital og gransking hendan vegin, men einkarætturin kann elva til at uppfinningarnar ikki kunnu gagnnýtast nóg væl, tí tær gerast ov dýrar, orsakað av einkarrættverjuni, og at vit fáa siðsemiligar trupulleikar í samfelagnum.

Einkarættur í biotøkni er eitt trupult evni, sum nógv verður kjakast um kring heimin. Politikkarar í einstøku londunum gera av, hvat skal verða lógligt og ikki á økinum, t.d hvat ber til at fáa einkarrætt á. Tað er givið, at teir ikki hava servitan á økinum, men mugu stuðla seg til t.d. siðsemisnevndir. Í Danmark er t.d eitt serligt Bioetisk ráð, sum viðger hesar spurningar. Men niðurstøðan hjá slíkum ráðum er eisini tilvildarlig soleiðis at ásjónin hjá teim limunum, sum sita eitt ávíst tíðarskeið, er avgerðandi fyri niðurstøðurnar í sama tíðarskeiði. Onnur tilvild var sum sagt. ein dómur í USA, har fimm vóru fyri og fýra ímóti.

## Danskt málsøki í ES hami

Arbeitt var i farnu samgongu við at yvirtaka málsøkið einkarrættur, men arbeiðis steðgaði tá val bleiv skrivað út. Sjálvt um fyrireikingarnar sum so vóru lidnar, er arbeiðið ikki tikið uppaftur. Í Føroyum standa vit í dag í tí støðu, at vit hava fyrndargamla ikki dagførda danska lóggávu á økinum. Spurningurin er, hvat vilja vit? Vilja vit ílegugranskíng, kann tað tykjast bakvent ikki eisini at vilja stýra einkarrættinum, sum er sera avgerðandi á økinum. Men vit kunnu eisini velja bert at kopiera donsku lóggávuna, sum so aftur er kopierað frá ES, og soleiðis hava ES standard í Føroyum. Tað er uttan iva ein løtt loysn, sum ikki krevur grundleggjandi umhugsni viðvíkjandi virðinum, vit ynskja okkara biotøkni at fylgja. Hinvegin gevur tað ikki okkum tann fleksibilitet at gagnnýta okkara sermerkir. Tað kann skjótt verða at vit í evarskalítlu Føroyum hava onnur áhugamál enn stórlondini og teirra risafyritøkur í ES. Men tað kann eisini verða at vit ikki koma at hava tað. Provokerandi kann eisini spyrjast, um tað er nøkur orsøk at yvirtaka eitt málsøki, um ætlanin bert er at kopiera donsku lóggávuna og broytingarnar í henni, sum koma umvegis ES broytingar. Leggjast skal afturat, at áskoðarnirnar í ES á hesum økið eru ógvuliga ymiskar, og tí er talan um kompromisloysnir.

## Føroyar afturútsigldar

Støðan hjá okkum gerst so ikki verri enn í dag. Í okkara vanliga falska status quo hugaheimi, halda vit, at heimurin stendur í stað, um ikki vit gera broytingar, og soleiðis hava vit ein avoldaða lóggávu á økinum, sum slettis ikki tekur støðu til møguleikarnar og avbjóðingarnar í dag í biotøknini. Støða skal takast til, um vit ynskja at yvirtaka málsøkið og soleiðis hava størri møguleika at innrættað eftir okkara viðurskiftum, ella vit bert skulu fylgja ES/Danmark og dagføra so hvørt tey dagføra - hava minni umsiting, færri trupul ting at taka støðu til, og tryggja okkum at vit fylgja ES standardi. Men tað tykist givið, at líkamikið um vit velja at yvirtaka málsøkið, ella lata tað verða á donskum hondum so verður tað sum partur av evropeisku skipanini og koma vit tí eisini at fylgja reglunum. Talan er um at yvirtaka myndugleikan, ikki at byggja upp fullfýggjaða einkarrættarskipan.

Men tað merkir ikki, at lógarverkið ikki skal dagførast, tað má hon.

Status quo er ikki til, so broytingar skulu gerast….tora vit tað á hesum torskilda øki?

*Kelda . Morten Dige, Humane Gener, patenter og etik: 2004*